**VIÐMERKINGAR**

# Vit hava eina grundlóg

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Ein partur av fullveldisætlanini, sum fór av bakkastokki í 1998, var at gera eina føroysk grundlóg, sum skuldi áseta grundleggjandi rættindi og skyldur millum ætlaða føroyska statin og fólkið.

Ein grundlógarnevnd varð vald, sum skuldi lata landsstýrinum uppskot til grundlóg í seinasta lagi 1. juni 2000, og fólkaatkvøða skuldi vera um grundlógina seinni sama ár.

Men at gera eina grundlóg er ikki løtuverk og tí hevur landsstýrið tvær ferðir verið noytt at leggja uppskot fyri tingið um at fáa tíðarfreistina longda.

Sambandsflokkurin hevur fleiri ferðir víst á, at Løgtingið eigur altíð at taka útgangsstøði í galdandi lóggávu, og ikki í einum dreymi um, hvat møguliga fer at galda einaferð í framtíðini. Tí var tað óheppi, at landsstýrið álegði grundlógarnevndini at gera uppskot til eina lóg, sum bara kundi brúkast, um Føroyar fyrst vórðu fullveldi.

Meðan grundlógarnevndin hevur arbeitt, er fullveldisætlanin slept, og í dag hava vit eina landsstýrissamgongu, sum ikki hevur fullveldi sum mál. Kortini arbeiðir grundlógarnevndin víðari eftir løgtingssamtyktini sum sigur, at nevndin skal handa landsstýrinum uppskot til grundlóg í seinasta lagi 25. apríl 2005. Men hvat skal eitt landsstýri, sum ikki ætlar at broyta ríkisrættarligu viðurskiftini, brúka eitt grundlógaruppskot til ?

Sambandsflokkurin metir, at arbeiðið, sum fakfólkini í grundlógarnevndini higartil hava gjørt, er í sær sjálvum eitt dygdargott arbeiði, men tað eigur ikki at verða brúkt til at gera eina nýggja grundlóg fyri Føroyar. Vit eiga harafturímóti at broyta arbeiðssetningin hjá grundlógarnevndini, soleiðis at tað góða arbeiðið, sum higartil er gjørt, kann brúkast til at gera eina nýggja stýrisskipanarlóg, nú fullveldisætlanin er slept.

Hetta hava vit fingið við í samgonguskjalið, har tað stendur soleiðis um stjórnarskipanina: *"Arbeiðið í grundlógarnevndini skal skipast av nýggjum. Uppgávan er at gera eina stjórnarskipanarlóg, sum eisini inniheldur ásetingar um mannarættindi og onnur rættindi. Umframt at lýsa verandi ríkisrættarligu støðu, skal lógin innihalda greiðar mannagongdir fyri, hvussu farast skal fram, um ríkisrættarliga støðan verður broytt."*

Umráðandi er at fáa arbeiðssetningin hjá grundlógarnevndini broyttan skjótast til ber, soleiðis at nevndin kann arbeiða víðari eftir nýggja politiska viljanum.

# Fólkaræði á hálvari stong

**Hergeir Nielsen**



Verju- og trygdarmál eru undir donskum málsræði, og løgtingið hevur einki innlit havt í hesi viðurskifti farnu hálvu øldina.

Undir viðgerðini av løgtingsmálinum um verju- og trygdarpolitikk Føroya noktaði samgongan løgtinginum alt innlit í hetta mál, og svaraði ongum settum spurningi.

Sostatt bendir einki á, at tingið fær nakað innlit framyvir heldur, og hevur givið alla hugsandi ávirkan frá sær til løgmann at sita á.

- Undir nevndarviðgerðini varð biðið um at fáa orð á løgmann, men sýtt varð fyri hesum.
- Biðið varð um at fáa nærri kunnleika um ARRC og Partnership for Peace, men sýtt varð hesum.
- Biðið varð um at síggja svarskriv frá danska verjumálaráðnum til fyrispurning løgmans um avtøkuna av donsku verjuni í føroyskum sjó-, land- og loftøki, men sýtt varð fyri hesum.
  Biðið varð um at fáa innlit í íslendsku og grønlendsku skipanina fyri samstarvi við NATO, men sýtt varð fyri hesum.
- Biðið varð um at fáa kunning um verjuskipanina fyri Orknoy- og Hetlandsoyggjarnar, men sýtt varð fyri hesum.
- Biðið varð um at innkalla serkønar í stýrisskipanarviðurskiftum, sum kundu greiða frá valdsbýtinum í trygdarmálum í breiðari høpi, men sýtt varð fyri hesum.
- Sóknast varð eftir, hví tað var so umráðandi hjá løgtinginum at geva frá sær samtyktir sínar í verju- og trygdarmálum, men einki svar fekst hesum viðvíkjandi.
- Sóknast varð eftir, hví tað hevði so stóran skund at avgreiða málið, men einki svar fekst hesum viðvíkjandi.
  Biðið var um meiri tíð og høvi til at viðgera málið, men sýtt varð fyri hesum.
- Meirilutin hevði einki ynski um nakra nærri viðgerð ella um at kalla inn til nakra nevndarviðgerð.

Stórmálið um trygdarpolitikk Føroya hevur sostatt onga nevndarviðgerð fingið, og teir sum ætla sær innlit og ávirkan frá øðrum. noktað sínum egnum somu møguleikar.

Málið kundi eins væl veri farið beinleiðis til aðru viðgerð uttan nevndarviðgerð.

Vit harmast sjálvsagt hesi burturav ódemokratisku viðuskifti, ið hava tikið seg upp á tingi, har noktað verður einum minnluta innlit og ávirkan undir einari málsviðgerð.

Nevndararbeiðið er lagt lamið, fólkaræðið er skúgvað til síðis og Føroyar eru vorðnar ein enn meiri skerdur fuglur sum demokratiskt samfelag.

**Tingskipanin**

Tingskipan okkara sigur annars, at:

- »tað áliggur nevndarformanninum at gera nevndararbeiðið skjótast gjørligt, og
- tá ið nevndarformaðurin heldur, at sjónarmiðini hjá nevndarlimunum eru lýst til fulnar, og allar upplýsingar fingnar til vega, verður álit skrivað.«

Føgur orð um fólkaræði okkara, mugu hesar ásetingar í tingskipanini sigast at vera, men syndarliga illa verður farið um hetta ræðið fólksins.

Leiðslan í sambandsflokkurin lá oman á málinum í samfullar 3 vikur, áðrenn tað varð sett á dagsskrá, og eftir formansskifti í nevndini avgreiddi nývaldi formaðurin málið eftir lítlari løtu.

Málið er risastórt og allar royndir áttu at veri gjørdar fyri at fingið eina breiða semju um nakað so grundleggjandi, sum trygd okkara her í Norðurhøvum.

Men nei, soleiðis skuldi ikki vera.

Sambandsflokkurin noktaði einum minniluta innlit í eitt mál, sum løgtingið hevði beint til viðgerðar í uttanlandsnevndini, har sjónarmiðini hjá nevndarlimunum skuldu lýsast til fulnar, og har allar upplýsingar skuldu fáast til vega, áðrenn álit kundi skrivast sambært tingskipanini.

Ein long røð av sjónarmiðum, sum vit vildu hava lýst nærri, varð borin fram, men noktað varð fyri, at vit fingu lýst hesi.

Eisini bóðu vit um at kalla inn eina langa røð av fólki, sum kundu lýst hetta mál nærri, men ikki eitt einasta eitt av ynskjum okkara varð gingið á møti.

Ikki so frægt at teir hirdu okkum høvið til at hitta løgmann á máli.

Meirilutin sjálvur helt seg ikki so frægt sum til at skriva álit heldur, men avritaði beinleiðis tað sum stóð í samgonguskjalinum um hetta mál.

Formaðurin og samgongumenn hansara høvdu ongan hug at viðgera nakað sum helst, men tað høvdu vit hinvegin góðan hug til, so sum tingskipanin eisini áleggur okkum tað.

**Løgtingsnevndir**

Fyri at styrkja um arbeiði sítt hevur løgtingð valt sær nevndir til at viðgera mál síni, men tað er ein farin tíð á okkara tingi.

Embætismenn í Tinganesi siga og skriva fólkavaldu umboðum okkara, hvat tey skula hugsa og gera, og tey fólkavaldu tora ikki at mukka.

Tjakið um verju- og trygdarpolitikk fyllir nógv í øllum grannalondum okkara, men her um okkara leiðir verður gamalt briksl kókað upp, og síðani verður lok lagt á.

Í grannalondum okkara verða semjur leitaðar upp millum allar flokkar á tingi, og eru hesar semjur galdandi eitt longri áramál fram í tíðina.

Soleiðs er tað ikki her hjá okkum.

Undir 1. viðgerð á tingi sprakk løgmaður sum trøll upp úr eskju og noktaði fyri einari breiðari § 25 nevnd, ið kundi mannast úr øllum flokkum á tingi.

Ikki talan um at draga út og órógva sær málsviðgerðina, segði løgmaður, og málið vísir seg at vera samtykt og niðurskrivað undir samgongusamráðingunum.

Eingin haki skuldi venda nakrari torvu, og eingin spaki skuldi venda nøkrum steini. Málið toldi ikki eina parlamentariska viðgerð hvørki á tingi ella í nevnd.

**Flaggdagsálitið**

Fyrra Flaggdagsálitið sigur ma., at:

- *»á tingi skulu viðgerast øll landsins týðandi mál,*
- *á tingi fær fólkið rødd, og landið tekur støðu sína, og*
- *tingsins ávirkan og semjusøkjan eru bygd á nevndararbeiði.«*

Hetta álit er ikki borðbært í okkara tíð og hóvar ikki okkara ódemokratisku samfelagsskipan.

Her um okkara leiðir valdar myrkur og trongskygni, og órættur og ódemokratisk viðurskifti hava fest røtur.

Samgongufólk hava úr at gera við at laga garð um ríkiseindina, meðan tey traðka undir føti tingskipan, stýrisskipan og flaggdagsálit okkara.

Upp ímóti hesum órætti mæltu vit til at samtykkja, at:

- »Løgtingið og landsstýrið eru umboð Føroya fólks í øllum lutum, og eru tað bert hesi, ið kunnu taka avgerð vegna føroysku tjóðina í trygdar- og verjupolitiskum viðurskiftum.«

At lata løgtingið fáa ræði yvir okkara verju- og trygdarviðurskiftum ræddist samgongan sum heitan brand og atkvøddi sum ein maður ímóti hesum uppskoti.

Vit hava jú verið kanónføði í hálva øld, so hví ikki halda stásið við líka eina tíð enn, er galdandi hugburður á tingi í dag.

# Varðar á kirkjugøtuni

**TÍÐINDASKRIV**
*frá Heimamissiónsforlagnum*




Heimamissiónsforlagið kemur í hesum døgum út við 2 nýggjum bókum.

Varðar á kirkjugøtuni er fyrsta bind í eini røð av fleiri bindum, sum ætlandi koma út á vári og heysti í nøkur ár.

Henda bókin er at skilja sum eygleiðing eftir tí farvegi, sum Heilagi Andin hevur leitt lýðin vitni upp gjøgnum tíðirnar fram til okkara dagar.

Víst verður á nakrar andligar rørslur, sum eins og aldur hava heygað á, og sum viðhvørt eisini hava brotið og gjørt um seg á kirkjuliga havinum.

Eisini verður víst á nakrar andligar varðar hjá kristnum fólki at halda seg eftir á lívsleiðini.

Við hesi bókini hevur verið ætlanin, sum nevnt í innganginum, bara at fara eygleiðandi um í kirkjusøguni. Men samstundis hevur verið roynt at vísa á ymsar andligar varðar, sum hava havt stóran týdning hjá kristnum fólki at halda seg eftir á lívsleiðini, tá ið tølandi myrkur og ódnarveður hevur gjørt leiðina illgongda og villingarsama.

Framhaldandi er ætlanin nú at taka seg niðan ta tunggongdu Heimamissiónsgøtuna í kirksøguni. Á hesi gøtuni er ætlanin at steðga við nakrar varðar og haðani líta í kring í andliga landslagnum, so hvørt sum strítt verður seg fram frá varða til varða.

Tað er Joh. Andr. Næs, ið hevur savnað tilfar og myndir til bókina.

Bókin kann keypast frá Heimamissiónsforlagnum í bókhandlum runt um í landinum, hon kostar 200 kr.

Eisini ber til innan 15. mai at tekna seg fyri alt verkið, og harvið fáa 20% í avslátri.

Ummæli av Gospelkvøldi við Larry Ford:

# Framúrskarandi tenorur

**Mikukvøldið 19. mai fingu vit enn eitt dømi um, hvussu veruligur »Southern-Gospel« sangur- og tónleikur skal ljóða, tá hann er bestur**

**UMMÆLI**
*Victor Carlsen*



*Eg tori at siga, at Larry gav alt hann hevði av orku hetta kvøldið, tí at enda kláraði hann ikki meiri og mátti viðganga at "I pushed it too hard"*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Amerikanski sangarin Larry Ford vitjaði land okkara á fyrsta sinni, og ivaleyst fær hann tað eins og so mong onnur, ið vitja hendavegin, at higar vil hann sleppa aftur. Høllin á Eiði var nærum stúgvandi full hetta kvøldið, og væl var kvøldið fyriskipað við felagssangi áðrenn gesturin kom á pallin. Eisini í støðginum og innímillum fingu vit loyvi at syngja við.

Larry Ford er ikki nakar ársungi, tá tað kemur til at syngja. Longu sum ungur stóð honum í boði at gerast operasangari, tí rødd hansara var væl egnað til leiklutir innan hetta økið. Men, sum hjá so mongum, so legst lívsleiðin øðrvísi til rættis, og við tað at Larry gjørdist ein persónligur trúgvandi maður, so var honum fremst í huga at syngja andaligar sangir.

Hann kom skjótt inn í ta sjangru, sum í dag verður kallað: "Southern-Gospel", ein sangstílur, ið hevur síni sereyðkenni við at vera sungin í suðurstatunum í Amerika, og harav heitið. Andaligur sangur og tónleikur har, hevur verið ein ímynd fyri mangar kristiligar samkomur og kirkjur, og kanska serliga tær sokallaðu "Black-Gospel". Ásannast má, at mangar av heimsins størstu sangstjørnum, bæði fyrrverandi og núlivandi koma frá andligum umhvørvi, sum t.d. Elvis Presley, Whitney Houston og mong, mong onnur.

Larry Ford hevur m.a. sungið við í bólkinum "The Blackwood Brothers Quartet", har upprunamenninir vóru James og Doyle Blackwood, ein bólkur í stavar heilt frá 1934, og sum síðani hevur havt sítt virksemi heilt fram til dagin í dag, har tær ungu kreftirnar nú hava tikið við. Seinastu árini áðrenn James Blackwood doyði, var Larry eisini virkin í bólkinum "James Blackwood Quartet" og hava teir ferðast runt heimin við gleðiboðskapinum um Jesus í sangi og tónleiki. Í dag ferðast Larry fyri tað mesta fyri seg sjálvan og syngur sínar solosangir, eins og hann gjørdi fyri okkum á Eiði hetta kvøldið.

Fyri at alt ikki skuldi vera ov einstáttað, hevði hann valt at fáa "Ebenezer-kórið" við til at stuðla seg í nøkrum sangum, og hesum komu tey bara heilt væl frá, tá hugsað verður um, at tað vóru stór krøv sett til sangrøddirnar, ið bæði skuldu syngja hart og høgt - frálíkt!!

Hæddarpunktið á konsertini haldi eg kom, tá Larry eftir støðgin valdi at syngja tveir sangir saman við tónleikarunum, sum vanliga spæla niðri í Ebenezer. Eingin nevndur, men heldur eingin gloymdur av teimum, ið eg haldi komu sera væl frá uppgávuni og var tað næstan at samanlíkna við frá Nashville-framleidda tónleikin, ið Larry hevði við sær MD-fløgum. Hetta við sing-back tónleiki kann altíð viðgerast og eru tað ivaleyst mong, ið ikki rættuliga duga at venja seg við hetta, men eg veit av royndum, at fyri amerikanarar er hetta heilt vanligt. Hoyrdi nevniliga fleiri dømi um hetta sama nú eg var og vitjaði í Frazerburgh í Skotlandi. Vit her heima eru tíbetur meira von við veruligan tónleik og má eg siga sum er, at hetta dámar mær altso betur, men hitt ber eisini væl til at skipa soleiðis, at hetta virkar náttúrligt fyri tann, ið lurtar.

Sangúrvalið sum Larry hevði valt bar brá av tí, ið vit vanliga í dag hoyra á teimum vælumtóktu "Gaither-bondunum", sum í hesum døgum er ein veruligur stórídnaður yviri í Amerika, og ikki er hetta heldur so løgið, tí mong eru tey, ið væl dáma teir "góðu, gomlu" sangirnar, sum vekja sinn og huga. Í eini tíð herfyri við "Praise & Worship" sum uttan íhald sannliga eisini á sínum øki - uttan at siga nakað negativt um hetta - hevur verið ein sonn "landaplága" fyri mong, er tað tí við sannari frøi at eitt alternativ er. Minnist sjálvur at fyri nøkrum árum síðani leitaði eg við lykt eftir at finna "Southern-Gospel" tónleik og sang á skandinaviskum forløgum, uttan at hetta eydnaðist. Tað var beinleiðis grinið eftir mær, tí "slíkt kundi ikki seljast", varð sagt. Men, hyggið í dag, nú er støðan ein heilt onnur. Nú er sdannur gravgangur eftir hesum tilfari.

Eg tori at siga, at Larry gav alt hann hevði av orku hetta kvøldið, tí at enda kláraði hann ikki meiri og mátti viðganga at "I pushed it too hard". Ja, soleiðis kann tað ganga, men eg tori at siga, at vit, ið høvdu goldið 150, - kr. fyri kvøldið fingu valuta fyri peningin. Høllin var vakurt snákað til hetta høvið við vøkrum, pyntaðum palli í svørtum og gulli, og so fingu vit enntá kaffi og køkur áðrenn farið varð heim.

Eg fari at nýta hetta høvið at takka teimum, ið skipaðu fyri at vit fingu eitt gott og gevandi kvøld, ið saktans kann gerast umaftur. Vil gjarna endurtaka, at tað ber væl til at venja sangirnar við okkara heimligu tónleika- og sangkreftum, heldur enn sing-back tónleik.

# 2002 Nætur

**Yrkingar eftir Sigri M. Gaïni**

**TÍÐINDABRÆV**
*frá Mentunargrunni Studentafelagsins*




Yrkingasavnið »2002 Nætur« er ein heild í tveimum rásum. Onnur er frá fyrstu náttini við tilsiping til skapanina um úrvaldar nætur til ta tveytúsundogaðru náttina, har samband verður knýtt aftur til ta fyrstu. Ávegis er í einum filosofiskum hami sagt frá tilverukorum á fold. Hin rásin hevur í øllum yrkingunum undirtittulin Patos I-X, har tær kenslurnar hava orðið. Kærleiki og kuldi umskiftast, til deyðin er veruleiki.

Sterkar kenslur gera seg galdandi í savninum, sum er ognað vinkonu, ið doyði ung.

»2002 Nætur« er løgd til rættis og prenta á Hestprent. Hon er 30 síður til longdar og kostar 90 kr. Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út.

# Sigrun Mohr heldur fram sum forkvinna

**ALZHEIMER-FELAGIÐ**
*Tíðindaskriv*

Tann árligi aðalfundurin hjá Alzheimerfelagnum varð hildin 25. apríl í aulsuni á Føroya Læraraskúla.

M. a. var nevndarval á skránni: ein nevndarlimur fyri tey avvarðandi, Kári Árting, stóð fyri vali. Hann bar seg undan afturvali, og í hansara stað varð Siborg Arge skotin upp og vald uttan annað uppskot. Ein nevndarlimur umboðandi fakfólk, Erna Háberg, sjúkrarøktarfrøðingur, stóð fyri vali, og hon varð afturvald.

Joan Árting varð vald til tiltakslim at umboða tey avvarðandi.

Nevndin hevur skipað seg soleiðis

Sigrún Mohr er formaður, Sofus Joensen heldur fram sum næstformaður, Erna Háberg er skrivari, Randi Absalonsen er kassameistari, og Siborg Arge, sum er nývald, er nevndarlimur,

Varalimir eru Joan Árting, sum er nývald, og Unna Næs Petersen.

Eftir fundin var stuttur kaffisteðgur, áðrenn leikurin »Svíkja vit Hannis« varð framførdur. Eini 100 fólk sóu leikin, og gekk alt tiltakið væl.

– Hesin leikurin og leikhátturin kann brúkast á arbeiðsplássum, og vóna bæði leikarar og vit í Alzheimerfelagnum, at starvsfólk innan heilsuverkið og onnur fara at taka hetta tilboðið og møguleikan til sín. Á henda hátt eru møguleikarnir at viðgera demenstrupulleikan uttan mark, bara hugflogið avmarkar. Nevnast kann, at demenssamskiparar í Havn hava tikið stig til at undirvísa starvsfólki tann 5. juni í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum, og er avgjørt, at leikurin »Svíkja vit Hannis« verður framførdur tá. Hetta fegnast vit í nevndini um, sigur Alzheimerfelagið í tíðindaskrivi.

# GRUMS

Kassin gevur spørk,
tí hann skal spara.
Eru eingi mørk,
hvar ein kann fara.

Leska onkrun vini,
gev teim sama starv.
Heima sita hini,
hann og hon sum hvarv.

**bygdas**